# Snorri Brend fær herðaklapp frá Dugna

**Annað árið at Dugni heiðrar fólki við kærleikskúluni, er tað Snorri Brend, blaðmaður á Sosialinum, sum fær hendan heiður fyri at varpa ljós á fólk, ið hava ymisk arbeiðstarnandi hóttafall at dragast við**




*Snorri Brend, blaðmaður á Sosialinum, saman við listakvinnuni, ið hevur sniðgivið ársins kærleikskúlu, Sigrun Gunnarsdóttir, og Jóhan Samuelsen, formaður í stýrinum fyri Dugna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leo Poulsen

»Onkur her í okkara lítla landi roynir at vísa á viðurskiftini hjá arbeiðstarnaðum og møguleikar, og eisini fær hesi boð út um allar geilar. Og hesin persónurin situr mitt ímillum okkum í dag, og nú skal eg ikki halda tykkum á pínubonkinum longur, men avdúka, at tað er Snorri Brend«.

Soleiðis segði Johan Samuelsen, stýrisformaður fyri nevndina í Dugna, um grundgevingina fyri, at Snorri Brend varð valdur at fáa ársins kærleikskúlu.

»Í fimm væl uppsettum greinum í Sosialinum hevur Snorri Brend verið við til at breiða hendan boðskapin út millum manna. Og hann tók soleiðis til í einum telduposti til forkvinnuna fyri MBF, at øll hesi fólkini hava sína søgu, og tey hava styrkir og eginleikar, sum kunnu verða øðrum at gagni, íblástur og úthaldni. Og tað er júst hetta, ið ungi nólsoyingurin, ið situr í koyristóli og gongur á tekniska skúla, tann bara deyvi timburmaðurin úr Runavík og tann blinda konan úr Vestmanna, oyndfirðingurin við sínum seiggi og Tanja úr Kollafirði, sum fekk lívsmótið aftur á Dugnaskúlanum við Áir hava víst okkum gjøgnum hesar heilt ígjøgnum positivu greinar, sum Snorri setti á blað í vár«, segði Johan Samuelsen.

»Vit á Dugna takka tær og vilja vísa tær takksemi við at handa tær fyrstu kærleikskúluna í 2010. Hjartaliga tillukku og hjartaliga takk fyri greinarnar«, segði Johan Samuelsen á samkomuni á Listasavni Føroya fyrrapartin í gjár.

## Kempa víðari

Snorri Brend er sjálvur útbúgvin innan Heilsuverkið, og kennir tí væl til sjúklingar, sum koma inn í skipanina, men eisini sleppa úr henni aftur.

– Hetta er eitt øki, sum eg havi persónligan áhuga í. Eg var burtur úr starvinum á Sosialinum eitt ár, har eg royndi nakað annað. Tað, at vera burtur úr blaðmanna starvinum gav eisini rúmd til at hugsa, og sum eg nevndi so hevur hvør persónur sína søgu, sigur Snorri Brend.

Hann er sjálvandi sera fegin um hetta herðaklappið, sum Dugni hevur givið honum, tí tað merkir nógv, at eisini onnur, og í hesum førinum Dugni, sum til gerandis arbeiðir við arbeiðstarnaðum persónum, virðismetir tað arbeiði, hann ger.

– Hesi fólkini, sum eru orsøkirnar til hendan heiðurin, hava øll hvør í sínum lag eitthvørt líti at dragast við, men felags fyri tey øll er, at tey hóast hesar trupulleikar kempa víðari. Handan skalið bankar eitt hjarta og birtist ein vilji, sum ger, at tey hava áræði at stríðast víðari. Eg havi »bara« vøddasvinn, ella eg eri »bara« deyvur, siga hesir báðir, og tað vísir lívsmót, sigur Snorri Brend.

## Besta greinin

Á samkomuni í Listasavni Føroya fyrrapartin í gjár greiddi Snorri Brend frá, hvussu søgan um Tanju úr Kollafirði mest sum av tilvild fann vegin inn í Sosialin.

– Vit báðir Jens Kristian, myndamaðurin, vóru á veg norður eftir. Komnir norður um Hósvík stakk tað seg knappliga upp á meg, at fara inn á Dugnaskúlan við Áir, har eg ongantíð hevði verið áður, segði Snorri Brend.

Sum sagt so gjørt. Teir báðir fingu fatur í skúlastjóranum og fingu eisini »lánt« ein flokk í ein tíma.

– Meðan vit soleiðis sita og fáa okkum ein kaffimunn, kemur Tanja á skúlan á veg til arbeiðis á Bakkafrost. Hasa átti tú at tosa við, segði skúlastjórin, og vit kombineraðu tað soleiðis, at Tanja greiddi hesum skúlaflokkinum frá sínum royndum og trupulleikum, og hvussu Dugnaskúlin hjálpti henni víðari, segði Snorri Brend.

Hendan søgan var so góð, at hon gjørdist til bestu greinina, hann hevur skrivað yvirhøvur.

– Hetta er enn ein positiv søga um fólk, sum eru sloppin burtur úr einum truplleika og nú fungera eins og øll onnur í samfelagnum, segði Snorri Brend.

Hetta er annað árið, at Dugni skipar fyri at gera sonevndu kærleikskúlurnar. Fyrsta árið var í fjør, og tá fekk Kemilux heiðurin. Í ár var tað so okkara egni Snorri Brend, ið fekk herðaklappið og ársins kærleikskúlu frá Dugna. Tillukku við tí.